Beinir Johannesen
vegna Fólkaflokkin
Magnus Rasmussen
vegna Sambandsflokkin
Steffan Klein Poulsen
vegna Miðflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)
(Hækkan av hámarksupphædd)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 13, stk. 1 verður "kr. 25.000" broytt til: "kr. 28.000".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.
Stk. 2. Henda løgtinglóg er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag, sum henda løgtingslóg kemur í gildi, ella seinni.

Almennar viðmerkingar

Síðan barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, hevur eitt aðalmál verið, at farloyvistíðarskeiðið skuldi vera 52 vikur. Tað málið varð nátt í undanfarnu samgongu, tá farloyvistíðarskeiðið varð longt úr 48 í 52 vikur.

Nú komið er á mál við hesum, er tíðin búgvin at hyggja at øðrum tættum í barsilsskipanini. Markið fyri hvussu nógv ein í mesta lagi kann fáa útgoldið úr barsilsskipanini varð í 2004 lækkað úr 35.000 kr. í 25.000 kr. Hendan hámarksupphædd er ongantíð broytt og hevur staðið í stað síðani tá.

Stórur vøkstur hevur verið í lønum og prísum annars síðani 2004, og hetta hevur við sær, at fíggjarligi missurin av at fara í barnsburðarfarloyvi er størri í dag, enn hann var tá.

Uppskotssetararnir meta ikki, at familjur skulu hava stóran fíggjarligan miss av at velja at vera saman við barninum fyrstu tíðina, og tí er neyðugt at viðgera hámarksútgjaldið av nýggjum.

Við hesum uppskotinum verður skotið upp at hækka hámarksútgjaldið úr kr. 25.000 í kr. 28.000, sum er eitt stig rætta vegin.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri barsilsgrunnin, men mett verður, at broytingin er ráðilig.

Í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini fyri 2023 varð upplýst fyri Fíggjarnevndini, at gjaldførið í barsilsgrunninum var 16,2 mió. kr. Tøl útvegaði frá barsilsgrunninum vísa eisini, at síðan inngjaldið varð hækkað í 2021, er munandi meira goldið inn í grunnin, enn tað er goldið út.

	Goldið inn	Goldið út	**Úrslit**
2021	182.461.082	175.796.232	6.664.850
2022	192.270.212	173.244.182	19.026.030

Tøl útvegaði frá barsilsgrunninum vísa, at hevði hámarksútgjaldið í 2022 verið kr. 28.000, hevði hetta havt við sær meirútreiðslur uppá 5,7 mió. kr. fyri barsilsgrunninum.

Við støði í hesum upplýsingum verður mett, at tað er ráðiligt at hækka verandi hámarksútgjald við kr. 3.000 við verandi inngjaldi.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Hámarksútgjaldið verður hækkað úr kr. 25.000 upp í kr. 28.000.

Til § 2
Í stk. 1 verður ásett, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2024.

Stk. 2 er ein skiftisregla, sum ásetur, at foreldur at børnum, ið eru fødd ella ættleidd sama dag, sum lógin kemur í gildi, eru fevnd av lógarbroytingini.

Á Løgtingi, 29. september 2024

Beinir Johannesen Magnus Rasmussen Steffan Klein Poulsen